

**Bjørn Kalsø**
*løgtingsmaður*

# Makrelurin agn í politiskari profilering

Hóast formaðurin í Uttanlandsnevndini í Degi & Viku mánakvøldið segði seg úttala seg vegna Javnaðarflokkin, átti hann ikki at verið so opinskáraður um hvørja støðu, hann helt, at Føroyar áttu at hava í samráðingunum um makrelin.

Vanliga er nógv samskifti millum landsstýrismannin í fiskivinnumálum og Uttanlandsnevndina, tá samráðingar, sum tær um makrelin, standa fyri framman.

Stór virði standa upp á spæl. Tí sannlíkt er, at galdandi avtala um makrelin endaliga fer fyri bakka. Neyðugt er tí at finna breiða politiska semju um, hvussu farast skal fram í strembanini eftir at finna semju um nýtt býti, har meir verður í okkara part. Somuleiðis er neyðugt at leggja ætlanir um, hvussu farast skal fram, um tað ikki eydnast at finna semju.

Uttanlandsnevndin, sum er mannað við umboðum úr øllum politiskum flokkum, hevur í hesum sambandi sentralan leiklut. Hon hevur eisini latið landsstýrismanninum tilmæli um, hvørji krøv, føroyingar eiga at leggja fyri hinar partarnar, í eini roynd at fáa sum mest í okkara part.

Tilmæli av slíkum slag frá Uttanlandsnevndini verða av samráðingartaktiskum orsøkum, altíð latin í trúnaði.

Undan samráðingunum hevur tað oftast stóran týdning, at kortini verða hildin tætt at kroppinum fyri ikki at órógva samráðingargongdina. Best er eisini um mótpartarnir ikki til fulnar kenna, hvørja samráðingarkós vit ætla at leggja, fyri at røkka okkara máli.

Formaðurin í Uttanlandsnevndini er ikki hvør sum helst í hesum arbeiði. Tað heldur tí ikki, tá John Johannessen í Degi & Viku mánakvøldið skeyt seg undir at úttala seg vegna Javnaðarflokkin. Hansara orð vilja altíð verða sett í samband við støðuna hjá Uttanlandsnevndini. Tí var »makrelstuntið« í sjónvarpsstovuni mánakvøldið eftir míni bestu sannføring betur ógjørt.

### Dýrt agn

Formaðurin í Uttanlandsnevndini eigur at vita, at tað er ikki í sjónvarpsstovuni, at góðu úrslitini í fiskiveiðusamráðingum verða rokkin – heldur tvørturímóti.

Tað var tí neyvan fyri at vinna okkum størri part av makrelkvotuni, at formaðurin valdi at egna makrelin so dúgliga mánakvøldið.

Heldur man ætlanin hava verið at vinna sær sjálvum og Javnaðarflokkinum nøkur høglig politisk stig undan samráðingunum.

Í toska- og hýsufiskiskapi er makrelurin vanliga gott agn. Hvussu hann roynist í politiskum fiskiskapi er ilt at meta um, men verður hann ov dúgliga engdur nú, kann agnið fara at gerast okkum dýrt.



**Kristian Rasmussen**
*varastjóri og leiðari á verkleiðsludeildini Landsverk*

# Eitt ellisheim er ikki bert eitt ellisheim

Í grein í Dimmalætting mikudagin 19. mai verður staðfest, at tað kostar dupult so nógv at gera búpláss fyri eldri á ellisheimi í Vági, enn Yviri við Strond í Havn.

Fyrst er at siga, at verkætlanin í Vági og tann í Havn ikki kunnu samanberast uttan so, at vit fyrst gera okkum greitt, um fortreytirnar eru tær somu. Eru tær ikki tað, má samanberingin gerast við hesum í huga. Marknaðarumstøðurnar eru broyttar, síðani ætlanin í Vági varð boðin út. Tá var meira gongd á byggivirkseminum, og tí var áhugin millum arbeiðstakarar fyri hesi verkætlanini ikki so stórur, sum hann uttan iva hevði verið í dag. Í løtuni er kappingin so hørð, at vit síggja prísir, ið eru so lágir, sum sjáldan – kanska ongantíð – fyrr. Í so máta hevur Tórshavnar kommuna bjóðað út í tí røttu løtuni.

Í Vági bjóðaði Landsverk út í almenna lisitatión, og tað merkir, at verkætlanin er liðugt projekterað í tøttum samstarvi við eigaran (kommunurnar), starvsfólk og onnur serkøn, áðrenn arbeiðstakarar koma inn í myndina og geva tilboð. Í hesi tilgongdini er ásett eitt góðskustøði, ið samsvarar við góðskuna á øðrum ellis- og røktarheimum, ið eru bygd tey seinastu árini. Hesin útbjóðingarhátturin skuldi alt annað líka givið ta størstu kappingina og harvið teir lægstu prísirnar.

Tórshavnar kommuna hevur boðið heimið yviri við Strond út í totalentreprisu, og tað er einki skeivt í tí. Hetta merkir, at ásettur verður ein hámarksprísur, og teir bjóðandi skulu upplýsa, hvat teir megna at veita innan fyri henda fíggjarkarmin. Vansin við hesum útbjóðingarhátti er, at tann komandi eigarin ikki í sama mun kann gera sína ávirkan galdandi, eitt nú í sambandi við ásetan av góðskustøði, innrætting, tilfarsvali, støðd á búrúmum, hentleikum o.s.fr. Hesi viðurskifti hava avgerandi ávirkan á prísin.

Bústaðareindirnar í Vági eru alment kendar, men enn kenna vit ikki, hvussu tær verða yviri við Strond. Áðrenn tað kemur so langt, skal kommunan ivaleyst ígjøgnum eitt ella fleiri samráðingarumfør við tilboðsgevaran, og síðani skal verkætlanin prosjekterast. Og fyrr enn tann verkætlanin kemur av tekniborðinum, ber als ikki til at samanbera byggikostnaðin fyri hesar báðar verkætlaninar. So einfalt er tað.



**Dávid Isfeld**, *Hósvík*

# Mín síðsta viðmerking til Jóhan Petersen

Tað er heilt vanligt, at tingmál vera góðkend við einari avgerandi atkvøðu, har ein ella tvær blankar atkvøður eisini eru við í uppteljingini.

Eitt dømi, ið minnir um 1946:

Fyrst skal sigast, at hetta dømi bert minnir um fólkaatkvøðuna í '46 í prosent býtinum, men tað er jú eisini tað, ið tykist at viga mest hjá Jóhan Petersen.

Um eitt tingmál fær 16 atkvøður fyri, 15 ímóti og tvær eru blankar, so svarar tað til 48,5% fyri, 45,5% ímóti og 6% ógyldugar (blankar) atkvøður. Hetta úrslit hevði verið (og hevur eisini áður verið) góðtikið uttan himpr. Hvat verður sagt á tingsins røðarapalli ella úti í gongini er fullkomiliga líkamikið, og hevur onga ávirkan á úrslitið av atkvøðugreiðsluni á tingi.

***Tað er sum um Jóhan Petersen ikki skilur siðvenjurnar innan altjóða demokratiskar mannagongdir***

At skilja demokratiskar mannagongdir:

Tað er sum um Jóhan Petersen ikki skilur siðvenjurnar innan altjóða demokratiskar mannagongdir – tað kann sjálvandi eisini vera tað, sum er keppurin í hansara hjóli. Tað mál, ið fær flest atkvøður, verður samtykt. Tað nýtist ikki at vera hægri enn eitt ávíst prosent tal av veljaraskaranum ella av atkvøðunum. Tað er einfalt soleiðis demokratiska valskipanin virkar. Hvussu rættvíst hetta er, er eitt heilt annað mál og kjakevni.

Ein politisk finta, ið sló bakk:

Fólkaatkvøðan var ein dana- og sambandsfinta. Teir væntaðu, at ein slík fólkaatkvøða við so greiðum, avgerandi og stirvnum valmøguleikum, og so álvarsamum og endaligum avleiðingum, fór at fáa mong loysingarfólk til at missa pippi og dirvi, og sostatt atkvøða ímóti loysingini, tí loysingarvongurin var slettis ikki fyrireikaður til hesa megnar broyting. Tískil vóru loysingarfólk hvørki politiskt ella mentalt klár til hesa stóru og týdningarmiklu avgerð. Hetta vistu danir eins væl og sambandsvongurin; men til teirra vónbrot og ótta varð hóast alt ein lítil meiriluti fyri loysing. Fintan riggaði ikki, og so kom óruddiliga og demokratiháðandi uppruddingin. Um henda fólkaatkvøða var betur skipað og við longri skotbráði, og við brævaatkvøðunum úr Íslandi, so hevði meirilutin fyri loysingaruppskotinum óivað verið upp aftur størri – men tað fáa vit jú ongantíð at vita.